


Í Eik vilja vit hava næmingar, ið tora at ganga á odda og eru fúsir at vera partur av eini fyritøku, sum í fullari ferð stevnir móti nýggjum avbjóðingum í Føroyum og uttanlands.

**Vit bjóða**
Í Eik eru nýhugsan og framsøkni høgt í metum og hevur tú áræði, kanst tú vera við til at mynda og ávirka arbeiðsdagin á tínari deild.

Sum næmingur í Eik ert tú partur av einum væl samansæmldum toymi av ágrýtnum og professionellum fólki, sum á hvør sín hátt eru við til at gera Eik til eitt avbjóðandi og spennandi arbeiðspláss.

Í ár seta vit næmingar á deildum okkara í Kollafirði, Havn, á Sandi, Saltangará, Norðskála, í Gøtu og Sørvági.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Margrethu Rustin Heinesen, tlf. 348514, teldupost: margretha.heinesen@eik.fo

Les meira um næmingatíðina og útbúgvingina á heimasíðum okkara www.eik.fo og www.18-25.fo

Umsókn við avriti av prógvskjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2008, kl.12.00.

**Umsóknin skal sendast til:**
Eik
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

**Eisini ber til at søkja umvegis heimasíðuna**
www.eik.fo



# Leiðari til Dagstovnin Lítliskógur

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Dagstovnin Lítliskógur, at byrja 1. juni 2008 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er skipaður við tveimum vøggustovum, trimum barnagarðsstovum og eini stovu til 6 ára gomul. 20 starvsfólk eru knýtt at stovninum.

## Vit bjóða

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving og eftirútbúgving
- tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarnar

## Vit vænta at tú

- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu – barnagarðsbørnum.
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvið við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

## Setanarviðurskifti

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

## Meiri fæst at vita

um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra ella Katrina Petersen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

## Umsókn

saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi týsdagin 20. mai 2008.

Tórshavnar kommuna